## Pinkubarn ikki at finna

Løgreglan í Danmark stendur framvegis púra á berum í málinum um pinkubarnið, sum foreldrini burturfluttu av sjúkrahúsinum í Esbjerg seinasta fríggjadag. Foreldrini eru rúsevnamisnýtarar. Tí gjørdu myndugleikarnir av at taka barnið frá teimum, men tað vildu tey ikki og fóru avstað við tí. Lars Bjerregaard, sum stendur fyri leitingini hjá løgregluni, sigur við Ritzau, at løgreglan hevur fingið nógvar upplýsingar og ábendingar, men at einki hevur givið nakað úrslit. Hann ásannar, at tíðin gongur undan, tí barnið má fáa viðgerð, eftir sum foreldrini eru misnýtarar. Barnið og foreldrini eru nú eftirlýst í øllum Evropa.




## Heimleysir bankakundar

Tey flestu viðskiftafólkini hjá EBH-bankanum og Løkken Sparekasse fingu ein annan peningastovn, tá teir báðir peningastovnarnir fóru á húsagang fyrr í ár. Men 1.050 viðskiftafólk hjá EBH-bankanum og 50 viðskiftafólk hjá Løkken Sparekasse eru so tyngd av skuld, at eingin annar peningastovnur vil hava tey, sigur Erik B. Hansen, sum tekur sær av leivdunum av EHB-bankanum, við DR. Sum skilst er ikki talan um smápengar, tí bara tey 50 viðskiftafólkini í Løkken Sparekasse skylda 1,4 milliard krónur. Erik B. Hansen sigur, at tað kann fara at taka tvey ella kanska trý ár at finna eina loysn fyri tey skuldartyngdu viðskiftafólkini.

# Á ólavsøku er liðugt við ruðuleika á Krambatanga

**Landgongdin hjá Smyrli á ferjuleguni á Krambatanga í Suðuroy verður umvæld og verður liðug at taka í nýtslu á ólavsøku**

SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú verður skjótt, at ferðafólk við Smyrli sleppa undan at ganga eftir biladekkinum, tá ið tey ferðast við Smyrli umvegis ferjuleguna á Krambatanga í Suðuroy.

Nú er tað mesta av ein um ári farið síðani landgongdin fekk skaða, tá ið Smyril varð tikin av vindi, einaferð, hann skuldi leggja at.

Skaðin var so mikið umfatandi, at Smyril fekk ikki brúkt landgongdina longur og síðani hava ferðafólkið trákkast eftir at landgongdin bleiv umvæld, tí tað er ikki nøktandi fyri trygdina at ferðafólk, bilar, lastbilar, treylarar og bingjur eru hvørt um annað, tá ið Smyril leggur at á Krambatanga, ella fer avstað.

Hóast umvælingin bara kostar umleið eina millión, hevur tað verið ført fram, at talan hevur verið um ein fíggjarligan spurning, tí ráðini vóru ikki til at gera landgongdina uttan so, at Løgtingið játtaði pening til endamálið.

Men tíðliga í summar, varð peningur játtaður til endamálið og síðani eru tilboð heintað inn og umvælingin er sett í verk.

Einaferð var nevnt, at tað møguliga bleiv neyðugt at senda partar av landgongdini til Danmarkar at umvæla, men hetta verður av ongum.

Landgongdin verður nevniliga umvæld á skipasmiðjuni, Mest í Havn, og ein høvuðsorsøk til tað er, at teir kundu verða skjótast liðugir við arbeiðið, sigur Evald Kjølbro á havnadeildini hjá Landsverki.

Og hann sigur av eftir sáttmálanum skal landgondin verða liðug at taka í nýtslu fríggjadagin 24. Juli, tvs, beint upp undir ólavsøkuferðsluna.

### Gera fendarar

Men landgongdin er ikki einasta arbeiðið, sum skal gerast á, tí umframt hana, eru eisini fimm fendarar farnir og teir skulu gerast aftur nú.

Arbeiðið at útvega og seta fendarnarar upp er bjóðað út og tá ið freistin varð úti, vóru sjey tilboð innkomin.

Bíligasta tilboðið hevði Seastar, sum kann gera arbeiðið fyri 676.500 krónur. J&K Petersen hevði tvey tilboð, sum vóru ávikavist 757,800 og 846,200 krónur MEST bjóðaði 906,900 krónur, Tangavirkið 928.000 krónur, H.J. Grevstur bjóðaði sær at gera arbeiðið fyri 947,200 krónur og dýrasta tilboðið hevði Articon, sum vil hana 947.500 krónur fyri arbeiðið.

Arbeiðið skal verða liðugt í seinasta lagið 1. desember og Evald Kjølbro á Landsverki sigur, at samráðingar eru tiknar upp við SeaStar, sum var bíligast, um at gera arbeiðið.



*Tað hevur verið til stóran bága fyri ferðafólk við Smyrli, at tey, sum eru til gongu, nú í fleri mánaðir hava verið noydd at ganga ímillum bilar, treylarar og bingjur, men um tríggjar vikur er landgongdin klár at taka í nýtslu aftur*

# Góðtaka ikki uppsagnir hjá Landsverki

**Føroya Arbeiðarafelag góðtekur ikki uppsagnir hjá Landsverki í Suðuroy og vil hava tær ógildaðar.**

UPPSAGNIR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hesa seinastu tíðina hevur Landsverk sagt fleiri fólkum upp í Suðuroy, helst í grótbrotinum í Porkeri.

Nakrir av hesum uppsøgdu monnunum eru arbeiðsmenn.

Men hesar uppsagnirnar vil Føroya Arbeiðarafelag ikki góðtaka og felagið krevur sostatt, at tær verða afturtiknar.

- Vit kunnu ikki góðtaka tað, sum gongur fyri seg, staðfestir Ingborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag.

- Talan er um fýra arbeiðsmenn, sum eru limir hjá okkum og har vit ikki góðtaka uppsagnina, sigur hon.

Hon sigur, at samstundis, sum menninir eru uppsagdir, hevur Landsverk sett handverkarar at gera tað arbeiði, sum arbeiðsmenninir høvdu frammanundan.

Ingeborg Vinther staðfestir, at orsøkin til uppsagnirnar var, at eftirspurningurin eftir gróti og skervi er minkaður so nógv, at tað er ikki grundarlag fyri at hava teir í starvi.



*Ingeborg Vinther góðtekur ikki framferðina hjá Landsverki í Suðuroy*

Men hesa grundgevingina kann hon ikki góðtaka, tá ið Landsverk hevur sett handverkarar at røkja tær uppgávur, sum arbeiðsmenninir røktu frammanundan.

- Er tað ikki brúk fyri arbeiðsmonnunum, er tað heldur ikki brúk fyri handverkarum til at gera tær uppgávur, sum arbeiðsmenninir røkt frammanundan og sum natturliga hoyra undir teirra øki, sigur forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag.

Føroya Arbeiðarafelag er í samskifti við Landsverk um málið og tí fær forkvinnan onki sagt um, hvørjar avleiðingar tað fer at fáa verða uppsagnirnar ikki afturtiknar.

### Onki grundarlag

Oyvindur Brimnes, stjóri á landsverki heldur fast um, at tað er ikki grundarlag fyri at hava umrøddu arbeiðsmenn í arbeiði tí eftirspurningurin eftir gróti og skervi er so nógv minkaður.

Tí eru størvini hjá teimum niðurløgt.

Men fyri at gróttænastan ikki heilt skal detta niðurfyri, hava handverkarar avgreitt tær bíleggingar, sum hava verið.

- Talan er um handverkarar, sum vanliga røkja aðrar uppgávur, men sum traðka til og avgreiða tær bíleggingar um grót, sum Landsverk hóast alt fær.

- Men bíleggingarnar eru alt ov fáar til at hava fólk í arbeiðið bara til tað, men fyri yvirhøvur at varðveita eina gróttænastu, hava vit so valt hesa loysnina, har menn í øðrum arbeiði, kunnu leypa frá at avgreiða bíleggingar um grót, tá ið tørvur er á tí.

- Vit halda ikki, at eitt ávíst fakfelag eigur rættindini til nøkur ávís størv. Tí hava vit latið handverkarar avgreitt tær bíleggingar sum hava verið, men talan er ikki um at teir hava yvirtikið størvini hjá arbeiðsmonnunum, tí tey eru niðurløgd.

- Vil nakar hava grót, skal tað bera til at fáa grót og tískil hava vit valt hesa loysnina, sigur Oyvindur Brimnes.